# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um skatta- og avgjaldsmál

| Mál nr. :<br>24/00021 | Lóg:<br>Tolllógin<br>§ 18 | Avgerð tikin:<br>24. januar 2024 |
|---|---|---|

**Afturhildin postsending - rúsdrekka**


**Samandráttur:**
**Kært er um, at rúsdrekka er tikið burtur úr eini jólagávu, sum er komin sum postsending.**

**Føroya Kærustovnur staðfesti avgerðina hjá TAKS. Avgerðin er grundað á, at partur av postsendingini er staðfest at vera rúsdrekka, og sambært § 6 í rúsdrekkalógini hevur Rúsdrekkasøla Landsins einkarætt at innflyta rúsdrekka, og verður vøran burturbeind sambært § 18 í tolllógini.**


## Kærda avgerðin

> *" **Vit hava afturhildið parti av postsending hjá tær***
>
> *Partur av sendingini er staðfestur at vera rúsdrekka*. Av tí at Rúsdrekkasøla landsins sambært § 5, stk. 1, í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka hevur einkarrætt til at flyta inn slíka vøru, hava vit afturhildið hesum parti, avgerð er tikin um at beina fyri henni. Heimildin til fyribeiningina er at finna í § 18 í tolllógin.*
>
> **Glúhbirne 2,7% vol og Glúhbirne 5,1% vol*
>
> *Rest av sendingini verður útflýggjað*
>
> *[...]"*

## Kærarin

Í kæru, dagfest 22. desember 2023, greiðir kærarin soleiðis frá:

> *"Hey*
>
> *Vit hava júst móttikið jólagávu við hondskrivari heilsan. Nú vit lata upp, síggja vit at tit hava veri í pakkanum áðrenn vit. Fyri tað fyrsta eru tær forkunnugu drekkivørunar tiknar úr og burturbeindar. Ístaðin hava vit fingið eitt skriv (saman við mynd av vøruni) frá tykkum, hvar tit vísa á onkra heimild.*
>
> *Hesir løgirnir eru minni skaðiligir enn allar vørunar vit kunna keypa okkum í rúsunum kring landið, og tí óskiljandi fyri okkum. Samstundis eru gløsini í pakkanum brotin, sum vóru ætlað okkum at drekka løgin av.*

…"

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023 um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (rúsdrekkalógin).

Løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 161 frá 20. desember 2023 (tolllógin).

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**

Í § 6 í rúsdrekkalógini er ásett, at Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarætt at innflyta rúsdrekka.

TAKS hevur staðfest og skjalfest, at partur av postsendingini er rúsdrekka og hevur tískil lagt hald á rúsdrekka. Avgerð er tikin um at beina fyri rúsdrekkanum sambært § 18 í tolllógini.

**Vísandi til omanfyristandandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS. Avgerðin er grundað á, at partur av postsendingini er staðfest at vera rúsdrekka, og sambært § 6 í rúsdrekkalógini hevur Rúsdrekkasøla Landsins einkarætt at innflyta rúsdrekka, og verður vøran burturbeind sambært § 18 í tolllógini.**